

# Trýr at oljuframleiðsla kemur at loysa seg í Barentshavinum

**Jógvan Hugo Gardar**

06.09.2015 - 11:30

Oljan.fo

Nógv orðaskifti hevur veriv um leitast skal eftir olju í Barentshavinum, og um tað yvirhøvur kemur at loysa seg at framleiða olju og gass nærri Norðpólinum vit koma.

Hesum heldur leitistjórin hjá Statoil fyri norska landgrunnin, Arve Signe Nylund, er óneyðugt at gremja seg um.

- Vit vita ov lítið í dag til at siga um hvussu lønsemi verður í Barentshavinum. Fyrst mugui vit fáa yvirlit yvir hvussu nógv sum er av gassi og olju í økinum, sigur Nylund í samrøðu viðDagens Næringsliv.